# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# EIK FÆR BESTU LEIÐSLU

Tað kom als ikki óvart á, at nýggju eigararnir av Eik Banka fóru í BankNordik at leita, nú teir skulu finna nýggja leiðslu til bankan. Fólk hava bíðað í spenningi. Súni Schwartz Jacobsen var tann mest upplagdi, men tað kundi eisini hent, at nýggju eigararnir valdu at fara uttanlands at leita. Men hvat kann vera betur enn at finna ein persón, sum kennir alt til føroysk viðurskifti og føroyskan búskap, og sum kennir kappingarneytan so væl og virðiliga.

Í síðstu viku bórust tíðindi um uppsagnir í Eik. Tað hevur verið – og er framvegis væntandi, at ein verulig uppududding skuldi fara fram. Onkur hevur ábyrgdina av, at nakrar milliardir eru farnar fyri skeyti. Vanligir føroyingar hava mist nógvan partapening, og hóast bankar mæltu frá, so hava fleiri starvsfólk lænt nógvar pengar at keypa partapening í Eik fyri.

Men uppruddingin í síðstu viku hevði lítið við uppruddingat gera. Nakrar kassadamur fingu fótin, tvær deildir skulu niðurleggjast, meðan aðrar skerja upplatingartíðirnar.

Fyrrverandi bankastjórarnir vórðu sendir til hús við nøkrum milliónum í lummanum – og nú fóru so nøkur fólk á gólvinum sama veg, men bara ikki við fleiri ársinntøkum.

Við Súna Schwartz Jacobsen fær Eik Banki uttan iva eina góða leiðslu. Hann er kendur fyri at vera gløggur sum fáur og at vera ein tann dugnaligasti grannskoðarin í landinum. At hann nú sum tann einasti – við undantaki av Jørn Astrup Hansen – kann skriva á sítt cv, at hann hevur stjórnað tveimum føroyskum bankum, tað sigur ikki so lítið.

Men avbjóðingin er stór. Eik Banki skal nú fóta sær sum ein føroyskur banki í Føroyum. Brent barn ræðist eld – og nýggju eigararnir tykjast ongan áhuga hava í at hugsa um at stovna deildir uttanlands.

Ofta verður TF Holding borið saman við gamla Eik Banka og Eik Grunnin, tí at felagið er so fløkt samanskrúvað, at tey somu fólkini sita báðu megin borðið og taka avgerðirnar. Valið til umboðsráðið verður gjørt so fløkt og innviklað, at fólk ikki tíma at atkvøða, og tí verður tað eitt



sjálvtøkuborð hjá tí valevninum, sum hevur best atgongd til at fáa Tryggingina at senda út atkvøðuseðlar til sínar stuðlar.

Hetta er ein ódemokratisk skipan, sum eingin modernað fyritøka kann hava. Sjálvsagt átti felagið at sent øllum tryggingartakarunum – øllum eigarunum, hvør sín atkvøðuseðil. Alt annað er hykl! Tryggingarfelagið má tí broyta seg, so hetta skurvuta image ikki smittar niður til nýggja Eik Banka.

Men tað er gott og spennandi, at bankin fær eina góða og roynda leiðslu, og higani ynskja vit Súna Schwartz Jacobsen hepna hond og góðan byr!

## Væntandi at teir funnu stjóran hjá kappingarneytanum




# Logos Hope má rýma úr Føroyum

Gamla Norrøna, sum nú er trúboðaraskipið, Logos Hope, verður helst ikki undir føroyskum flaggi leingi afturat, tí tað er alt ov dýrt.

Hetta heldur Karsten Hansen úr Miðflokkinum vera stórt spell, tí Logos Hope tænir einum góðum endamáli.

Samstundis er talan um eitt skip, sum siglur um allan heim, eisini í tær mest fjarskotnu havnirnar og tað kemur sostatt í samband við milliónir og aftur milliónir av fólki.

- Við hvørt eru fleiri hundraðtúsund fólk umborð um mánaðin og tey síggja øll Merkið á hekkuni.

- Sostatt er hetta eitt heilt serstakt høvi at vísa føroyska flaggið fram fyri øllum heiminum.

- Men tað er so dýrt at vera undir føroyskum flaggi, at tað er vónleyst og tí verður nú kannað eftir, hvat flagg, Logos Hope skal undir.

Jenis av Rana staðfestir, at orsøkin er, at í føroysku altjóða skipaskrásetingini, FAS, verður bara skilt ímillum farmaskip og ferðamannaskipskip.

Í øðrum londum eru fleiri bólkar og hann heldur, at tað er spell at missa Logos Hope undan føroyskum flaggi, tí tað einasta, ið krevst, er ein lítil lógarbroyting.

Bjørt Samuelsen úr Tjóðveldi heldur, at løgmaður skal heita á Johan Dahl, landsstýrismann í vinnumálum, um at broyta lógina, so at skip, sum ikki eru í vinnuligum rakstri, eisini kunnu vera skrásett í FAS.

Kaj Leo Holm Johannesen staðfestir, at Logos Hope er besta umboðanin fyri okkara føroyska flagg runt um í heiminum og hann lovar at kanna málið við tí endamáli at broyta FAS, so at tað eisini er rúm fyri skipum, sum Logos Hope í okkara altjóða skipaskráseting.



## Aðalfundur hjá Tryggingini

ANDRASS SKAALUM

KJAK Á SÍÐU 24



## Lúgva føroysk oljufeløg?

DAVID ISFELD

KJAK Á SÍÐU 12

# Lovar ikki 100 prosent trygd

Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður, kann ikki lova Løgtinginum, at Arbeiðseftirlitið fer at virka hundrað prosent sum tað eigur, eftir at játtanin er skerd og tað er lagt saman við Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Tað einasta hann vil lova er, at Arbeiðseftirlitið fer at rigga so væl sum tilber innan fyri teir fíggjarligu karmar, sum eru til taks.

Hetta gjørdi hann Løgtinginum greitt tá ið Bjørt Samuelsen, tinglimur fyri Tjóðveldi, spurdi hann, hvørja trygd hann kann veita fyri at Arbeiðseftirlitið fer at megna at røkja allar lógarásettar uppgávur til fulnar, nú játtanin er skerd og stovnurin er lagdur undir Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.



- Eg haldi, at tað, sum er gjørt, er forsvarligt, leggur hann afturat.

Hann sigur, at endamálið er at samanlagdir stovnar kunnu troyta somu fólk og hentleikar.

Hann fór enntá víðari og metti, at eisini Brunaumsjón Landsins, ið somuleiðis er ein eftirlitsstovnur, eisini kann kann fáa nyttu av at samstarva við samanlagda stovnin, tá ið eftirlit skulu gerast.

Endamálið er at fáa rakstrarútreiðslurnar av almennu umsitingini niður.

Tinglimir spurdu, hvussu nakar kundi váttað at Arbeiðseftirlitið fer at virka til fulnar, tá ið stjórin sjálvur staðfestir, at hann er ikki serliga nøgdur við hetta økið, tí hann hevur eitt heilt annað virkisøki.

Løgmaður sigur, at fyri at varðveita eitt fakligt støði, skulu vit ikki hava stovnar við færri fólkum enn enn 20 fólkum.

Sosialurin

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*